HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Umsókn um góðkenning av stovnskøki

HS mál nr.:___________________

| ORSØK TIL UMSÓKN | |
|---|---|
| Nýtt virksemi ð | Víðkan av góðkenning ð |
| Eigaraskifti ð | Endurgóðkenning (5 ár liðin) ð |
| Umbygging/broyting í innrætting ð | Navnabroyting ð |
| Ætlaður upplatingardagur: | Annað: |

| UPPLÝSINGAR UM FYRITØKUNA | | |
|---|---|---|
| **Navn á fyritøku (umsøkjara)** | | |
| **Skrásetingarnummar í partafelagsskránni** | | |
| **Navn á partafelagsskránni** | | |
| **BÚSTAÐARUPPLÝSINGAR** | | |
| **Gøtunavn og nummar, postboks** | | |
| **Postnummar og býur/bygd** | | |
| **Matrikulnummar** | | |
| **Telefon nr** | **Telefaks nr** | **Teldupost adressa** |
| **ÁBYRGD** | | |
| **Stjóri (navn og útbúgving)** | | |
| **Dagligur leiðari (navn og útbúgving)** | | |
| **Eigari av bygningi** | | |

*Tilfar, sum skal fylgja við umsóknini sæst á næstu síðunum.*

| Staður | Dagur | Undirskrift stjórans |
|---|---|---|

Umsóknin skal sendast: Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkaveg 6[2], FO-100 Tórshavn.

# Vegleiðing til umsókn
# um góðkenning av stovnskøkum

Í sambandi við umsókn um góðkenning av stovnskøkum, eru ávís viðurskifti, sum skulu lýsast og skjalprógvast, fyri at umsóknin skal kunna avgreiðast.

*Mint verður á, at fylgjandi skal vera í lagi, áðrenn góðkenning kann veitast:*
- Køkurin skal vera innrættað sambært galdandi reglum á økinum.
- Harumframt verða allar loysnir mettar við tí fyri eyga, at heilsufrøðiligt arbeiðslag og skilagott framleiðslurensl skal verða møguligt.

*Galdandi lógir og vegleiðingar eru at finna á Heimasíðuni :* http://www.hfs.fo.

**Umsóknin:**
Skjølini við kravda tilfarinum at leggja við umsóknini, skulu talmerkjast samsvarandi niðanfyri standandi punktum. Harafturat skal hvør síða verða talgivin. Tekningar skulu vera dagførdar og í hóskandi støðd.

1. **Tekningar** skulu útvegast, sum vísa:
   1.1. **Køksøki, goymslur, innrætting og útbúnað**, so sum maskinur, hondvøsk, v.m. Hvørt einstakt rúm skal vera talmerkt, og ein skráseting og frágreiðing skal gerast av øllum rúmum.
   1.2. **Kulda- , frysti- og hitaútgerð** skulu skrásetast.
   1.3. **Renslið** av teimum ymisku matframleiðslunum ígjøgnum køkin.

2. **Kloakkskipan** skal vísast á tekning.

3. **Vatn:**
   3.1. Lýsast skal, hvussu vatnið verður reinsað, og hvør ger tað.

4. **Framleiðslan / matgerðin** skal lýsast:
   4.1. Eitt **flóðkort** skal gerast yvir tilvirkingina av hvørjum liðugvørubólki, sum á ein nágreiniligan hátt lýsir liðirnar í virkingini. Har flóðkortið ikki er nøktandi, skulu tey serligu viðurskiftini lýsast í frágreiðing, sum vísir til flóðkortið.
   4.2. **Skjalprógv**, um at pakningur er egnaður at koma í samband við matvørur, skal útvegast.

5. **Saniter viðurskiftir** skulu lýsast:
   5.1. Tal av fólki, sum arbeiða í køkinum.
   5.2. Tal av arbeiðsvaktum.
   5.3. Tal av WC-rúmum.
   5.4. Støðd á matstovu.
   5.5. Støðd á skiftingarrúmi.
   5.6. Tal av hondvøskum í sambandi við køkin. Plaseringar av hondvøskum kann vísast á tekning.
   5.7. Greiðast skal frá, hvussu arbeiðsklæði og útiklæði verða hildin atskild (um gjørligt víst á tekning).

**6.** Stýring av **sjálvrøkt** hjá starvsfólki:
   6.1. Greiðast skal frá, hvussu starvsfólkini verða upplýst um, hvussu tey eiga at klæða seg og bera seg at, fyri ikki at dálka matvøruna.

**7.** **Reinhaldsskipan** skal lýsast. Greiðast skal frá mannagongdum í sambandi við rudding , reingerð og reingerðarhátti í teimum ymsu køksøkjunum.

**8.** **Burturbeining av lívrunnum** burturkasti skal lýsast.

**9.** **Ruskskipanin** skal lýsast. Greiðast skal frá, hvussu rusk verður savnað, og hvar ruskbingjan er.

**10.** **Fyribyrging og týning** av skaðadjórum skal lýsast. Alt eftir umstøðunum kann vera neyðugt við flugufangarum, rottukøssum ella øðrum í sambandi við fyribyrging og týning av skaðadýrum.